Kongaliga vitjanin:

# Fyrireikingarnar ganga væl

**Fyrireikingarnar, sum Tórshavnar Kommunu ger til kongaligu vitjanina, ganga sum eftir ánni. – Tað er alt so smátt við at koma undir land, sigur borgarstjórin**

HOFF STOFF
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Jú, jú fyrireikingarnar ganga væl. Hevur tú ikki lagt merkið til, at vit asfaltera upp á lívið um allan býin, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri skemtandi.

### Skiftast um at vera vertir

Hann greiðir frá, at tá kongshjúnini koma til Havnar, er tað tó ikki Tórshavnar kommuna, sum verður vertur allatíðina.

– Tá kongaskipið leggur at, er tað Tórshavnar Havn sum tekur ímóti. Har er so nakað av fyrireiking hjá okkum við at fáa hornkrestur og landgongd o.s.fr. til høvið, men tað gongur alt uppá stás, greiðir borgmeistarin frá.

Tá regenthjúnini og krúnprinsahjúnini eru væl og virðiliga komin í land, spáka tey av bryggjuni og út á Tinganes, har løgmaður tekur ímóti.

– Á gongutúrinum út á Tinganes er tað Tórshavnar Kommuna, ið er vertur, og vit fara eisini at nýta okkara egnu, vandu ferðaleiðarar á túrinum. Men tá tey fara inn í Tinganes, tekur landsstýrið yvir. Tá tey koma útaftur, ganga vit út á Reyn, eftir Áarvegnum og inn í løgtingið. Á túrinum eru tað aftur vit, sum eru vertir, meðan tað inni í løgtinginum er tingið, ið tekur sær av gestunum, sigur Heðin Mortensen.

Kl 11 fer regentparið inn í dómkirkjuna, meðan krúnprinsaparið fer niðan á Margarinfabrikkina.

– Á middegi, ella kl. gott 12, hittast vit so øll niðri hjá Nólsoyar Páll. Tá verður tann officiella móttøkan frá Tórshavnar býráð, har allir býráðslimirnir við maka verða presenteraðir, greiðir borgmeistarin frá.

Eftir tað, verður farið yvir í Müllers Pakkhús, har ein biti verður til matna.

– Síðani verða pørini býtt sundur, og fara á tvær ymiskar rutur ymsastaðni runt um í býnum. Tey fara á barnagarðar, eldrasambýli, søvn o.s.fr. Tey fara umborð á kongaskipið aftur um 17.30–18.00 tíðina, so tað verður ein langur dagur, staðfestir Heðin Mortensen.



*Nógv er at síggja til, nú kongalig vitjan verður í Havnini. Her síggjast borgarstjórin og fólk frá býráðnum saman við løgregluni ganga rutuna, sum kongapørini skulu ganga 20. juni. Trygdin má vera í hásæti, og tí er nógv at hugsa um og gera klárt. Officiella móttøkan frá Tórshvanar býráð verður niðri hjá Nólsoyar Pálli, og her skal tí serliga ansast væl eftir*

*Mynd Jens Kr. Vang*

### Gávur handaðar

Tað plagar at vera siðvenja, at kongsfamiljan fær gávur frá vertunum, tá tey eru á vitjan. Og vitjanin í Havn verður einki undantak.

– Tað verða gávur handaðar, og vit fara nokk tann vegin, at tað verður ein í part, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin vil tó ikki úttala seg um hvat ætlanin er at geva teimum.

– Alt er ikki endaliga komið upp á pláss enn viðvíkjandi gávunum, men ætlanin er, at tað skal verða eitt yvirraskilsi. So tit mugu bíða inntil 20. juni við at síggja hvat tey fara at fáa, sigur Heðin Mortensen at enda.

# 3 havfrýr í ein størri sal

**Konsertin við Eivør, Guðrun og Lenu, sum skal vera í Keypmannahavn 4. juni, er nú útseld. Men enn standa nógv á bíðilista, og tí vóna fyrireikararnir at sleppa í eina størri konserthøll**

KONSERT
*eydna@sosialurin.fo*

750 atgongumerki eru nú seld til konsertina, sum Kvinna skipar fyri, við trimum havfrúgvum í Keypmannahavn. Men enn er áhugin sera stórur, og tí er avgjørt at royna at fáa eitt størri høli.

Størra hølið er tó treytað av, at fleiri fólk veruliga eru áhugað at koma. Tí hevur Kvinna gjørt ein bíðilista.

Um 350 fólk afturat seta seg á bíðilistan til konsertina áðrenn kl. 10 fríggjamorgunin, so verður konsertin flutt úr høllini, ið tekur 750 fólk, og yvir í høllina, sum tekur 1800 fólk.

Tekningin er bindandi, men um ov fá fólk tekna seg, og konsertin tí ikki verður flutt í størru høllina, verður einki gjald tikið.

Fríggjamorgunin kl 11. verður kunngjørt á www.kvinna.fo og á www.3havfruer.dk, hvørt konsertin verður flutt ella ikki.

Krúnprinsavitjan á dagstovninum á Hamrinum:

# Børnini gleða seg

**Á síni vitjan í Havnini skulu krúnprinsahjúnini m.a. leggja leiðina framvið dagstovninum á Hamrinum. – Børnini eru sera spent, frætta vit av Argjum**

HOFF STOFF
*eydna@sosialurin.fo*

– Vit hava enn ikki fingið alt endaliga at vita frá fyrireikarunum í býráðnum, men vit hava onkrar ætlanir. T.d. ætla vit, at børnini skulu gera eina framsýning, sigur Elisabeth Henriksen, ið er leiðari á dagstovninum á Hamrinum.

Hon greiðir frá, at børnini eru ógvuliga spent til kongaligu vitjanina.

– Men tey vænta sær sikkurt, at tað verður ein prinsessa sum í ævintýrunum í stórum prinsessukjóla og øllum, ið har til hoyrir. So vit mugu bara vóna, at tey ikki gerast skuffað, heldur Elisabeth fyri.

Spurd, um børnini munnu vita hvørji Mary og Frederik eru, svarar Elisabeth, at tað vita tey væl.

– Vit gjørdu rættiliga nógv burturúr, tá krúnprinsaparið giftist. Vit seymaðu skjúrt til genturnar, høvdu kongakrúnur og ymsikt annað. So tað minnast børnini væl, og tey gleða seg nógv at síggja prinsin og prinsessuna í veruleikanum, sigur Elisabeth Henriksen at enda.

